# ÚTLOND

SAMBAND
ÁRNI JOENSEN
FARTEKST@MAIL.DK

*- Myndugleikarnir í Zimbabwe fara illa við kvinnum, og fleiri hundrað eru bukaðar, tí tær hava mótmælt*

*(Amnesty International)*

# Floksfelagar keglast

**Tey bæði fremstu forsetavalevnini hjá demokratunum í USA, Hillary Clinton og Barrack Obama, keglast nú alment um evnini hjá hvør øðrum**

Keglið byrjaði mánadagin, tá Barrack Obama segði, at verður hann valdur til forseta, fer hann ivaleyst at vera sinnaður at hitta leiðararnar í londum sum Iran, Sýrialandi, Venesuela, Kuba og Norðurkorea.

- Ábyrgdarleyst og óbúgvið, svaraði Hillary Clinton, sum samstundis nýtti høvi til at endurtaka, at Obama hevur lítlar ella rættari sagt ongar royndir í uttanríkispolitiskum viðurskiftum. Barrack Obama var ikki seinur at svara aftur.

- Í 2002 atkvøddi hon fyri at senda amerikanskar hermenn til Irak. Tað var ábyrgdarleyst og óbúgvið, helt hann.

Anthony Lake, sum var trygdarpolitiskur ráðgevi hjá Bill Clinton, forseta, virkar nú sum ráðgevi hjá Barrack Obama, sigur, at sum forseti ætlar Obama at tosa við tey, sum USA liggur í stríði við. Hann ætlar at gera tað, sum Nixon gjørdi við Kina, og sum Reagan gjørdi við Sovjetsamveldið, sigur Anthony Lake.



*Tey eru floksfelagar, men tann felagsskapurin er lagdur til viks, nú valstríðið upp undir næsta forsetavalið er byrjað*

# Regnið hóttir gamla Oxford

**Vatnflóðin í Onglandi er tann ringasta í 60 ár, og vatnið hóttir nú fleiri ferðavinnumál so sum gamla universitetsbýin Oxford**

Tað óvanliga nógva regnið hevur havt við sær, at áin Isis er farin langt upp um bakkarnar við tí úrsliti, at tann kendi og gamli botaniski garðurin hjá lærda háskúlanum í Oxford stendur undir í vatni. Støðan er tann sama í fleiri av teimum gomlu húsunum.

Útlitini eru heldur ikki tey bestu, tí teir bretsku veðurmenninir siga frá meiri regni og størri vatnflóð. Teir seinastu dagarnar er vatnið minkað eitt sindur, men tað hjálpr lítið, tí í morgin fer tað aftur at regna av grimd, siga veðurmenninir.

Myndugleikarnir siga, at umleið 4.500 hús standa undir í vatni, 50.000 fólk hava ongan streym, og umleið 350.000 hava mist vatnveitingina. Hildið verður, at regnið hevur gjørt skaða fyri meiri enn 30 mia. krónur.

- Men vit hugsa fyrst og fremst um Oxford og Abingdon, tí í morgin vænta vit, at Isis verður uppaftur størri, sigur ein talsmaður hjá umhvørvismyndugleikunum við AFP.



*Í Oxford er áin Isis farin upp um bakkarnar, so ein stórur partur av tí kenda universitetsumhvørvinum stendur undir í vatni*

# Íslendingar vænta gos

**Seinastu fimm mánaðarnar hava næstan 2.000 smáir skjálvtar verið nærhendis Vatnajøkli**

Í Íslandi standa jarðfrøðingarnir til reiðar, eftir at tað hevur verið rættiliga ófriðarligt í undirgrundini norðanvert Vatnajøkul teir seinastu mánaðarnar. Jarðfrøðingarnir siga, at skjálvtarnir, hava hava verið, eru óvanligir, og at umstøðurnar minna um tær undan tí stóra gosinum í Vestmannaoyggjunum í 1973.

Síðani síðst í februar hava jarðfrøðingarnir skrásett næstan 2.000 skjálvtar. Jarðfrøðingurin Páll Einarsson sigur við blaðið Vísir, at skjálvtarnir eru óvanliga langt niðri í undirgrundini, og at jarðfrøðingarnir hava ikki staðfest skjálvtar so langt niðri síðani gosið í Vestmannaoyggjunum.

## STUTT SAGT

### Russar troyttir av sviki

Fyri fyrstu ferð halda russar, at tann politiski myndugleikin eigur at seta bardagan ímóti sviki ovast á dagsskránna. Tað vísir ein nýggj meiningakanning, og har siga 45 prosent av teimum spurdu, at bardagin ímóti sviki eigur at vera týdningarmesta málið hjá myndugleikunum. Fyrr hava russar sett prísvøkstur ovast á dagsskránna, men kanningin vísir, at russar eru troyttir av sviki, sigur stovnurin Jurij Levada Analyse Center, sum hevur gjørt kanningina.

### Tvíburðar doyðu

Seinasta leygardag vóru boð eftir bretsku bjargingartænastuni at hjálpa einari kvinnu, sum júst hevði átt tvíburðar. Kvinnan búði í býnum Tewkesbury, men har var vatnflóð, so sjúkrabilurin slapp ikki eftir kvinnuni og nýføðingunum. Tað eydnaðist at fáa kvinnuna upp í eina tyrlu, meðan ein onnur tyrla tók tey bæði børnini, men sambært Sky News doyðu bæði børnini, áðrenn tyrlan kom til sjúkrahúsið. Sambært læknunum hevði kvinnan bara gingið 21 vikur við teimum báðum børnunum.

### Lóg um hvíld

Tann nógvi hitin, sum hevur verið í Ungarn ta seinastu tíðina, hevur fingið onkran at skjóta upp at áseta við lóig, at fólk skulu hava rætt til eina hvíldarløtu ella siesta hvønn dag. Ætlanin er at leggja málið fyri eina fólkaatkvøðu, og tað er í veruleikanum ikki so torført, tí eftir galdandi lóg kunnu 200.000 fólk krevja fólkaatkvøðu í Ungarn. Tey, sum eiga hugskotið, savna nú undirskriftir.